NØVN Í VIKUNI

# Brynhild Absalonsen 85



Fríggjadagin 6. august verður Brynhild Absalonsen í Klaksvík 85 ár.

Brynhild er ættað av Viðareiði. Foreldrini vóru Olaf Joensen og Sára, sum var ættað av Skælingi. Tá tey giftust í 1910, búsettust tey á Viðareiði. Brynhild var triðja barnið í systkinaflokki upp á seks. Haldor Olafson og Solveig Joensen, sum bæði búgva í Havnini, eru framvegis á lívi. Hini vóru Arne, ið doyði sum ungur, Herborg, sum var gift við Gunnari Gunnarson og Heini Svarthamar.

Í 1939 giftist Brynhild við Stefan Absalonsen við Løkin ella Stefan á Viðareiði, sum hann varð nevndur í Klaksvík.

Tey búðu fyrstu árini á Viðareiði, men nakað eftir kríggið fluttu tey til Klaksvíkar, har tey bygdu á Gerðareiði.

Brynhild og Stefan fingu seks børn, og sum hjá so mangari aðrari føroyskari konu miðskeiðis í farnu øldini, so var tað leikluturin hjá Brynhild at hava ábyrgdina av børnunum og heiminum, meðan maðurin fyri tað mesta var burturi á føroyskum og onkuntíð útlendskum kjøli.

Brynhild og Stefan vóru gift í 60 ár. Bara nakrar fáar dagar eftir, at tey í 1999 høvdu havt diamantbrúdleyp andaðist Stefan. Tey bæði vóru trúgv í samkomuni í Betesda, og tey hava eisini verið hollir stuðlar hjá Zarepta í Vatnsoyrum.

Gudsótti, gestablídni og friður vóru eyðkenni fyri hesi fyrimyndarligu og vísu hjúnini, og hóast Brynhild nú hevur rokkið teimum 85, so er hon framvegis gløgg, skilagóð og áhugaverd at koma á tal við.

Tvey av børnunum eru ikki okkara millum longur. Jóhannes, sum var føddur í 1940, druknaði á vánni í Klaksvík í 1968. Sára, sum var fødd í 1944, doyði av sjúku í fjør. Hon og maðurin, Jógvan Østerø av Trøllanesi, bygdu uppí hjá Brynhild og Stefani.

Árni, Elsa, Olav og Símun búgva øll í Havnini. Tað er hjá dóttrini, at Brynhild er at hitta seinnapartin fríggjadagin.

# Eyðun og Terji í oljudans

**Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen fara saman við bólki sínum at spæla til dans á dansistaðnum Platform um vikuskiftið**



*Eyðun og Terji spæla hetta vikuskiftið á dansistaðnum Platform í høvuðsstaðnum*

Fríggjakvøldið og leygarkvøldið fara Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen at leita sær umborð á Platform.

Dansistaðið verður karmur um dans við Eyðuni og Terji, og hesaferð hava teir allan bólkin við sær. Eyðun og Terji hava áður spælt unplugged á Platform, men hesaferð er tað við fullum bólki.

Eyðun og Terji spældu í teltinum í Kommunuskúlagarðinum ólavsøkuaftan, og tað vóru eini 1200 fólk til dansin. Sama tal var til dansin við All that Rain, sum var á sama staði kvøldið eftir.

Eyðun og Terji hava givið eina fløgu út saman, og teir hava annars samstarvað nógv. Teir spældu báðir í Frændum miðskeiðis í áttatiárunum, og síðani hava teir upptraðka saman av og á.

Seinnu árini hava teir havt meira støðugt samstarv og hava havt ein felags bólk, sum hevur spælt nokk so fitt í Føroyum og onkuntíð í Danmark, har teir eru búsitandi.

**ek**




# Nógv fleiri bilar skrásettir

Samlaða talið av nýggjum bilum, sum vóru skrásettir fyrra hálvár í ár, vaks við 16 prosentum samanborið við sama tíðarskeið í fjør.

Nógv tað størsta talið av bilum, sum verða skrásettir hjá Bileftirlitinum eru persónbilar. Frá január mánaði til juli mánað vóru 903 nýggir persónbilar skrásettir, og tað var 14 prosent meira enn somu tíð í fjør.

Talið av nýggjum persónbilum er støðugt økt seinastu árini, og líkt er til, at hesi vøkstur heldur fram í ár.

Næststørsti bólkurin av akførum eru vøruvognar, og eisini her var ein fittur vøkstur fyrstu seks mánaðirnar í ár. Fyrsta hálvár í 2000 vóru 171 vøruvognar skrásettir, meðan talið var 191 somu mánaðar í ár. Hetta er ein vøkstur upp á næstan 12 prosent.

Talið av skrásettu lastbilum er nakað tað sama higartil í ár, sum tað var í fjør. Fyrra hálvár 2000 vóru 11 nýggir lastbilar skrásettir, meðan talið fyri fyrra hálvár í ár er 11.

Samlaða talið av skrásettum akførum fyrstu seks mánaðirnar í ár er 11856, meðan tað var 1025 í fjør.

**ek**



†

Kæri, elskaði maður mín, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Dánjal Dánjalsson,**
**Klaksvík**

fór heim til Harran týskvøldið 31. juli, 79 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Betesda leygardagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Karla**

Tey, ið ynskja at minnast Dánjal, kunnu lata Akrinum eina peningagávu, konto í peningastovnunum.



# Sparikassar lækka rentuna

**Norðoya og Føroya Sparikassa lækka rentuna, og tað kemur millum annað bústaðarlánum til góðar**

PENGAR
*Eyðun Klakstein*

Bæði Norðoya Sparikassi og Suðuroyar Sparikassi broyta rentuna hjá sær. Sparikassin í Norðoyggjum hevur sett broytingina í gildi frá 21. juli at rokna, meðan Føroya Sparikassi hevur brúkt 1. august.

Øll bústaðarfígging í Føroya Sparikassanum fær ágóða av rentulækkingini.

Rentan á 1. og 2. veðrætti lækkar við einum fjórðings prosentstigi. Tó lækkar rentan á 1. veðrætti, har trygdin er serliga góð og seriulán eru partur av fíggingini, við hálvum prosentstigi p.a. Í hesum førum verður rentan á ytru veðrættunum óbroytt.

Rentubroytingin er eitt úrslit av, at danska rentustøðið er lækkað seinasta hálva árið, sigur Føroya Sparikassi í tíðindaskrivi.

Eftir rentulækkingina er rentan á bústaðarlánum hereftir henda: 1. veðrættur 6,00% - 6,25% p.a. og 2. veðrættur 8,75% - 9,50% p.a.

Stór kapping hevur tikið seg upp um bilfígging. Rentan á billánum í Føroya Sparikassa lækkar við 1,5 — 2,25%, soleiðis at rentan á billánum hereftir verður 6,5% - 8,5% p.a. alt eftir útgjaldi og møguligum eyka trygdum.

## Útlán

Norðoya Sparikassi hevur broytt renstuna soleiðis, at rentan á bústaðarlánum, 1. veðrættur, er nú 6 % fyri seriulán og 6,25 % fyri annuitetslán.

Er talan um 2. veðrætt er rentan 8,25 % fyri seriulán og 8,50 % fyri annuitetslán. Rentan á 3. veðrætti verður framyvir 9,25 %.

Norðoya Sparikassi hevur valt at halda fast við at øll, ið læna frá sparikassanum, fáa síni bústaðarlán til somu rentu. Sparikassin heldur at besta skipanin er at hava føst rentustig á bústaðarlánum, heldur enn at hava ymisk rentustig á eitt nú 1. veðrættarlánum.

Rentan á billánum er nú 6,75 % um nýggjur bilur verður keyptur, og útgjaldið er 50 %. Er útgjaldið 25 % er rentan 8,25 %. Er útgjaldið minni, ella talan er um eldri bilar, liggur rentan millum 8,75 % og 9,75 %, valdandi støddina av útgjaldi ella hvussu gamal bilurin er.

## Innlán

Fyri innlán á 12. mánaðar sparikassabók er rentan 4 %, men um ein er ábyrgdari í Norðoya Sparikassa er rentan hálvt % hægri ella 4,5 %.

Norðoya Sparikassi hevur ongar ætlanir um at fara undir at rokna støkkrentu, tað vil siga hægri rentu um saldo á konto er størri enn kr. 100.000,-. Í staðin fyri hevur sparikassin valt at geva øllum ábyrgdarum henda fyrimun, uttan mun til støddina av innláninum.

Barnakonto og ungdómskonto fáa eina rentu, sum er 5 %, meðan kapitalpensjónskonti fáa 5,5 %.

Hægstu innlánsrentu fáa tey sum spara upp á bústaðarkonto, her er rentan nú heili 7,5%. Hetta er tí ein sera góð uppsparing hjá teimum, ið ætla at byggja ella keypa hús komandi árini.



*Føroya Sparikassi og Norðoya Sparikassi hava broytt rentuna*

# Yvirtaka øll A-mál ísenn

**Landsstýrið hevur tilevnað eitt uppskot, sum stutt og greitt sigur, at føroyska heimastýrið skal yvirtaka øll viðurskifti, sum standa sum A-mál í heimastýrislógini. Uppskotið varð lagt fram á tingi í gjár**

YVIRTØKA
*Rúnar Reistrup*

Nógv av teimum málum, ið standa sum A-mál í Heimastýrislógini, eru longu yvirtikin, men enn vanta nøkur, til dømis skúlamál og almenn forsorg. Í næstum fara øll tey írestandi A-málini á føroyskar hendur.

A-mál kunnu, sambært Heimastýrislógini, flytast yvir til føroyska heimastýrið uttan samráðingar um so er, at føroyska heimastýrið ella danska ríkisstjórnin ynskir tað. Í Heimastýrislógini verður harafturat ásett, at yvirtøka av hesum málum hevur ta fylgju, at føroyska heimastýrið tekur á seg tær útreiðslur, ið fylgja við málunum.

Í hesum førinum er tað føroyska heimastýrið, ið ynskir, at málini skulu flytast á føroyskar hendur, og tað einasta sum krevst er, at uppskotið um at yvirtaka øll A-mál, verður samtykt á tingi. Tað verður tað helst innan stutta tíð.



